

# Talið á virknum boripallum er minkað við 59 prosentum

**Jógvan Hugo Gardar**

18.05.2015 - 07:58

Oljan.fo

Fyri 23indu vikuna á rað minkar talið á oljuboripallum sum eru virknir á landi í USA. Hendan gongdin verður brúkt sum ein peikifingur um gongdina í oljuprísinum og í oljuídnaðinum. Tað er Baker Hughes sum fylgir við, og sambært teirra teljing var talið á boripallum sum framvegis framleiða olju á amerikanska meginlandinum í farnu viku 660.

Talið á virknum pallum hevur støðugt minkað síðani oljuprísurin fór at lækka í summar. Tá flest pallar vóru í virksemi, í oktober 2014, tá var talið 1609. Nú eru bara 660 eftir, ein lækking uppá 59 prosent, skrivar Wall Street Journal.

Hóast framleiðsluorkan er minkað nógv, so sæst hetta ikki aftur í øktum oljuprísi. Goymslurnar eru enn so stórar at oljuprísurin bara spakuliga kvinkar uppeftir.

Í morgun er prísurin á amerikansku lættoljuni, WTI, farin úr 59,71 dollarar fyri fatið til 59,91 dollarar fyri fatið. E24 skrivar at Norðsjóvaroljan Brent er farin úr 66,83 dollarar til 66,97 dollarar fyri fatið av olju.

Sambært Baker Hughes økti talið á virknum gassboripalum við tveimum til 223 í farnu viku, meðan talið á boripallum sum bora á sjónum er tað sama, 34 boripalar.

Til samans fyri allar boripallar sum eru í virksemi í USA, so er talið hesa vikuna 888 pallar, ið er ein fækking við 973, samanborið við somu viku fyri einum ári síðani